# LUTASEÐIL

Fæst á Statoilstøðunum kring landið



1. Toyota Corolla 1.6 Terra Sedan (Frá Reyni Service) — virði 199.600 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm t/r við uppihaldi í eina viku í Danland ella DanCenter (Frá Smyril Line) — virði 19.995 kr.
3. Olja frá Statoil — virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi — virði 10.000 kr.
5. Apex ferðaseðil fyri 2 til DK t/r (Frá Smyril Line) — virði 6.266 kr.
6. Gávukort frá LM handlinum — virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Radiohandlinum v/ E. & P. Persson — virði 5.000 kr.
9. Føroyskt krov — virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 4. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 5. og 6. august 2003.
Eisini kann ringjast til Kristiannu tlf. 227 717 · 312 380 · 319 017

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð 2003 — 20 kr.


Toll- og Skattstova Føroya

## Til feløg v.m.

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjamálaráðnum.

[illegible]

Heimasíða www.tollskatt.fo

E-mail tollskatt@tollskatt.fo

### Innlatingarfreistir viðv. sjálvuppgávum og roknskapum

Sjálvuppgávur og roknskapir viðvíkjandi árinum 2002 hjá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m. við roknskaparskyldu skulu vera Økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

1. juni 2003,

um roknskaparskeið teirra endar í ella fellur saman við álmannakkaárinum 2002.

Sjálvuppgávan verður roknað at vera innlatin rættstundis, tá hon er fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella er latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

### Ber til at leingja freistina?

Tá serlig grund er til tess, kunnu Økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2003, treytað av at
- umsóknin er skrivlig
- umsóknin er send áðrenn 1. juni 2003
- sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru innkomin.

Argir, 22. mai 2003

Toll- og Skattstova Føroya

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2202, Sp/f Bátatænastan, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 12.03.2003.
**Nýtt navn:** P/F Bátatænastan
Kapitalur:
Hækking við kr. 840.000,00 til kr. 1.200.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 840.000,00 við grunshækking.

*Skráseting Føroya tann 21. mai 2003*
*Kristin Balle*


# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Frítíðarskúlin Í Hornabø**

Í frítíðarskúlanum í Hornabø ganga umleið 40 børn. Karmarnir eru góðir til mennandi virksemi bæði innan og uttandura.
Økið rundan um er barnavinarligt og møguleikarnir til virksemi úti í náttúruni eru fjølbroyttir.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at virka í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.

## Pedagogar til frítíðarskúlan í Hornabø

Tórshavnar kommuna søkir eftir tveimum pedagogum 30 tímar um vikuna til børn í 1. flokki. Størvini verða sett 11. august 2003.

**Vit ynskja at tú**
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- ert førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- ert áhugaður í uttandura virksemi, har veðrið ikki er ein forðing
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- ert við til at menna tað pedagogiska virksemið

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann-Elisabeth Joensen, leiðara, tlf. 314467/214467, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. juni 2003.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Stella Maris vøggustova**

Í vøggustovuni ganga 44 børn.

19 starvsfólk arbeiða á stovninum.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika til at gera tína ávirkan galdandi.

Stovnurin liggur mitt í býnum tætt við viðarlundina.

## Pedagogar til Stella Maris vøggustovu

Tórshavnar kommuna søkir eftir tveimum pedagogum. Ein 25 tímar um vikuna til Summardáan og ein 30 ella 40 tímar um vikuna til Sólareyga. Størvini verða sett 12. august 2003.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megna at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kristinu Eldevig, leiðara, Haldis Lisberg,varðaleiðara tlf. 31 28 53 ella 21 28 53 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Stella Maris vøggustovu, Varðagøtu 11, postsmogu 1202, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mikudagin 4. juli 2003

www.torshavn.fo



MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# YVIRLÝSING

## STUÐUL TIL MASKINMEISTARAFELAGIÐ OG TEIR MASKINMEISTARAR, SUM STARVAST HJÁ FISKIVEIÐIEFTIRLITINUM

Undirritaðu fakfeløg lýsa við hesum okkara fulla stuðul til Maskinmeistarafelagið í stríði teirra móti Fiskiveiðieftirlitinum.

Samstundis lýsa vit okkara stuðul til teir maskinmeistarar, sum nú standa í vanda at missa størv síni, tí aðrir maskinmeistarar gera sær dælt av trætuni millum Maskinmeistarafelagið og Fiskiveiðieftirlitið.

Vit átala samstundis harðliga teir maskinmeistarar, sum soleiðis falla bæði Maskinmeistarafelagið og limir felagsins í ryggin.

Hesir maskinmeistararar eru vælvitandi um, at talan er um eina ósemju millum arbeiðsgevarapartin og fakfelagið, og tí skilja vit als ikki, at teir við umsóknum sínum stinga fótonglar fyri teir maskinmeistarar, sum í royndunum at fáa loyst trætuna, hava sett størv síni uppá spæl.

Vónandi stendur øll føroyska fakfelagsrørslan saman móti slíkum ágangi og vit vilja staðiliga ráða maskinmeistarunum frá at søkja lýstu størvini, so leingi trætan millum felagið og Fiskiveiðieftirlitið ikki er loyst. So mikið av samanhaldi vóna vit, at hesir maskinmeistarar kenna mótvegis starvsfeløgum sínum.

At enda skulu vit staðliga mæla Fiskiveiðieftirlitinum til at medvirka til, at málið verður loyst, við at verandi maskinmeistarar halda áfram í størvum sínum.

Tórshavn, 22.05.2003

| | |
|---|---|
| Føroya Arbeiðarafelag | Starvsmannafelagið |
| Havnar Arbeiðskvinnufelag | Pedagogfelagið |
| Havnar Arbeiðsmannafelag | Havnar Handverkarafelag |
| Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag | Tvøroyrar Handverkarafelag |
| Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag | Vágs Handverkarafelag |

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Yvirlaborantur til Náttúruvísindadeildina

Søkt verður eftir yvirlaboranti til starvsstovuna á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum við setan frá 1. august 2003 at rokna.

**Starvið**
Starvið er 3/4- tíðar starv. Tað fevnir um:

- Planlegging, fyrisiting og arbeiðsfordeiling á starvsstovuni
- Fakligt og annað samskifti inn og út av starvsstovuni
- Eftirlit og bíleggingar av vørum
- Starvsstovuarbeiðið, so sum:
  - Kemiskar, fysiskar og mikrobiologiskar analysur
  - Framleiðslu av reagensum
- Ábyrgd og viðlíkahald av starvsstovutólum
- Heintan av prøvum til kanningar
- Faklig vegleiðing av studentum

**Førleiki**
Vit vænta at tú:
- ert laboratoriuteknikari ella laborantur við starvsroyndum
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert røkin
- hevur kunnleika til vanlig telduforrit, td Microsoft Office

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Magnussen á tel. 35 25 50 ella á teldupostadressu eydfinnm@setur.fo

**Løn**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, fl. V.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum viðmælum, skulu vera Náttúruvísindadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2003. Umsóknir skulu sendast til: Náttúruvísindadeildin, Postrúm 2109, FO 165 Argir.

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetrinum eru íalt 8 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Harumframt eru tvey starvstovufólk á starvsstovuni (hendan lýsingin er eftir øðrum teirra) og tvey skrivstovufólk í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Phd-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir og modellering av alduviðurskiftum við Føroyar. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, kunningartøkni, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru um 35 studentar á NVD, harav 18 taka BS í kunningartøkni, skipað sum hálvtíðarlestur. Harafturat eru um 20, ið lesa einstakar lærugreinir.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin Kurla hjá Føroya Tele**

Í Dagstovninum Kurlu ganga 34 børn.

Stovnurin er skipaður við einari barnagarðsstovu og einari vøggustovu.

Á stovninum eru 9 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

## Pedagogur til dagstovnin Kurlu hjá Føroya Tele

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 35 tímar um vikuna. Starvið verður sett 15. august 2003 ella eftir avtalu. Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett í fyribils starv.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Duritu Dam, leiðara, tlf. 353500 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Kurlu, Sundsvegur 3, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. juli 2003.

www.torshavn.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3405, P/F Televarpið, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 26.03.2003.
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 1.100.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 100.000,00 til kurs 3.000
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:**
Reidar Nónfjall, á Fløtti 2, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 22. mai 2003*
*Kristin Balle*


# GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
# Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
# Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045